# BØNARLØTAN

**Mai** **2018** **33. árg.**


## *1. Týsdagur* *Matt. 10.1-15*








## ATLANTIC MISSION

### Svenning av Lofti

2. - 16. mai ger Atlantic Mission evangeliseringsferð til Orknoyar við Juvel II. Vit vitja høvuðsstaðin Kirkwall umframt onnur støð, t.d. Stromnes og oynna Hoy. Evangelisk tiltøk og útifundir verða hildin.

## KRINGVARPIÐ

| | |
|---|---|
| 13. mai | Sjónvarpsandakt, John í Skemmuni. |
| 27. mai | Sjónvarpsandakt, John í Skemmuni. |
| 3. juni | Útvarpsmøti, Bethel, Vágur. |
| 24. juni | Sjónvarpsmøti, Vitnið, Hvalba. |

**R7** (meir á www.evr.fo)

Sunnukvøld . kl. 20 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

## Føroysk møtir í Jútlandi

| | |
|---|---|
| 5. mai kl. 19 | føroyskt møti í Ådalsparken 33, Esbjerg. Vit byrja aftur í sept. |
| 5. mai kl. 19 | føroyskt møti í Bethaniakirkjuni í Aalborg |

## *2. Mikudagur* — *2. Mós. 38.1-31*

### SENEGAL, Tongia
### Lív Poulsen

Í apríl vórðu Rómbr., 1.Timoteusarbr., og Titusbrævið kannað og góðkend til prentingar. Eg haldi á at týða 1. og 2. Tessalonikabræv og Opinberingina. Míni samverkafólk fara í farloyvi fyrst í mai, tí verði eg einsamallur trúboðari her í bygdini. Tað er ofta trupult og tungt, tá samverkafólk eru farin, og trýstið verður ofta ómetaliga stórt.

### VENESUELA, Puerto Ordaz
### Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen

5. mai bjóða vit nógvum samkomum og fólki her í býnum til missiónsdag. 25. - 27. mai hevur bíbliuskúlin eisini missiónsstevnu fyri fólk úr samkomum úr øllum landinum. Tørvur er á tænarum til skurðin.

## FØROYAR

**Birgit og Svenning av Lofti**



23. mai til 4. juni eru Birgit og eg í Ísrael við ferðaliði við umleið 30 fólkum. Ferðin ber heitið „Aðru ferð“, tí hesi hava verið í Ísrael áður. Á páskaferðini vórðu 8 føroyingar doyptir í ánni Jordan.

**– Maria og Jens Bech**
**– Rutt og John í Skemmuni**

***3. Hósdagur*** ***Sálmur 136***



## DANMARK

**Keypmannahavn, Kristnastova**
**Dora og Niels Pauli Nónstein (f)**
**Sigrid 10, Andreas 8, Kristina 7**

27. mai vitja vit samkomurnar í Filadelfia og Elim; 30. mai samkomuna í Siloa. Annars undirvísir Niels Pauli á familjulegunum í Zarepta í mai og juni.

## FILIPSOYGGJAR

**Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**



Cathy og Noah miða ímóti at vera liðug við skúlaárið síðst í mai. Jógvan Júst rættlesur tvær ymiskar umsetingar av 1. Mósebók. Fyrru helvt av mai eru vit á bíbliuskeiði í Spania.



## SKOTLAND, Motherwell

**GLO, Tilsley College**
**Dorit og Simon Marshall**



**FØROYAR**
**Anna Maria og Rógvi Joensen**
Fyri tveimum árum síðan fór Rógvi í farloyvi frá tænastuni. Hann er nú til skips helvtina av árinum. Heima ferðast vit kring landið at hava møtir og onnur tiltøk í smærri samkomum. Av tí at Rógvi siglir út frá Hirtshals, luttekur hann eisini javnan á møtum har. 12. - 13. mai vitja vit Akurinn í Kópavogi saman við Vanju og Svein í Prestgarði. Sangløta verður leygarkvøldið kl. 19, tá vit eisini bjóða til ábit við føroyskum viðskera. Sunnudagin luttaka vit á møtinum kl. 14. Sigið føroyingum og føroyavinum har á leiðini frá!



**Vanja og Svein í Prestgarði,**
**Jenny 10, Svend 9, Terji 5, Petra 4**
Vit hava føroysk møtir í samkomuni Akurinn í Kópavogi 12. - 13. mai. Í juni verður farið umborð á Juvel II úr Nuuk norður til Sisimiut. Eg verði partur av gospeltúrinum við Norrønu í juni og umhugsi at gera eina fløgu afturat í 2019.
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

## *5. Leygardagur* *2. Mós. 39.1-21*



### DANMARK, Hirtshals, Malta
### Anna og Hans Djurhuus

Væl stuðlað úr Føroyum høvdu vit møtir á Malta á páskum. Tað er lívgandi at fáa vitjan. Biðið, at Orðið og sangurin ber ávøkst. Vit fara til Aalborg í kvøld til føroyskt møti.



### USA, Alabama, NTM
### Judy og Óli á Grømma Jacobsen

Judy og eg luttaka á bíbliuskeiðnum fyri føroyingar í Spania 1. - 11. mai. Síðan koma vit aftur til Føroya at vitja samkomur til 24. mai. Gott at vitja nakrar vikur í Føroyum. Síðan fyrireika vit nevndarfundir í Florida og skeið í Bolivia fyri trúboðarum úr sjey londum í Suðuramerika. Hetta er fyrsta vitjan okkara í Bolivia.

### USA, North Carolina
### Charlotte, Calvary Church
### Gudny og John Munro

Nógv fremmand hoyrdu gleðiboðskapin á páskum! Biðið, at tey taka ímóti. Vit høvdu ein praktfullan túr í Ísrael.

## *6. Sunnudagur* *Matt. 10.27-42*

### PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)
### Carol og Poul Joensen, Ísak 15

Innfararloyvi til PNG er fingið til vega. Nú fyrireika vit ferðina til Sorimi í juli til sept. Bíbliutekstirnir, sum eru umsettir, skulu rættlesast í summar.

## *7. Mánadagur* *2. Mós. 39.22-43*



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**
Eg eri á málskeiði í Onglandi í mai. Biðið, at toymið í Meksiko fær orku at halda á og vísdóm at týða Orð Guds til skilligt mál.



**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 13, Victoria, 11, Emma Grace 10, Jónatan 8, Markus 6, Evita Linda 3, Joy Hanna 1**
Sum familja tørvar okkum lívsmót. Fleiri eru komin til trúgv. Nú innrætta vit samkomubygningin og leggja takið á. Vit vóna at náa tað, áðrenn regntíðina fyrst í juni. Tørvur er á góðum samarbeiði í samkomuni.

## *8. Týsdagur* *Matt. 11.1-15*



**FØROYAR**
**Else og Poul Johan Djurhuus**
Vit fara til Danmarkar 10. mai og vitja á Malta nakrar dagar. Síðani fara vit á leguna hjá Glostrup Frikirke, har Poul Jóhan skal hava bíbliu-tímar. Harumframt hava vit fleiri aðrar vitjanir í huga.

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen, Kano 8, Nana 6, Louie 4**
**FRAKLAND, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen, Sarah 7, Leah Eve 4**
⋆ Í dag fyllir Terji í Prestgarði 6 ár.

## *9. Mikudagur* *2. Mós. 40.1-17*



**DANMARK, Keypmannahavn**
**Susan og Øssur Berghamar**

Vitjanir á Ríkissjúkrahúsinum og andaktir á Sjúklingahotellinum geva okkum høvi at stuðla fólki gjøgnum samrøður og forbøn. Susan hevur stríðst eitt sindur heilsuliga og verið til onkrar kanningar. berghamar@kristnastova.dk

**DANMARK, Måløv**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Eva 17, Miriam Joy 14, Noah 11, Lydia Sigrid 1**

Vit gleðast um, at sonur okkara Noah varð doyptur páskamorgum og vísti, at hann ynskir at fylgja Jesusi. Andrew hevur bíbliutímar á samkomuleguni hjá Skovlunde Frikirke 10. - 12. mai.

## *10. Kristi himmalsferðardagur* *Sálmur 137*



**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Erla og Ingvard Petersen, Natan 15**

Vit fara nú undir árligu eftirmetingarnar av næmingum á fyrsta ári. Vit tosa við hvønn einstakan um, hvussu hann hevur klárað árið bæði akademiskt og andaliga.

**Monika og Tim Sharp**
**Ragnhild 14, Rebekka 13, Hanna 10**

Tim er um at vera liðugur við fyrsta stig at umseta ávís brot úr 4. og 5. Mósebók. Á øðrum stigi má hann fara til Naplud at rættlesa saman við fólki har.

## *11. Fríggjadagur* *Matt. 11.16-30*



**DANMARK, Kolding**
**Jan og Anne Zachariassen**

Jan er formaður í European Deaf Christian Bible Translator (EDCBT). Ætlanin er at stovna deyvabíbliufeløg í fleiri londum og at umseta Bíbliuna til landsins teknmál. Biðið, at tað eydnast at stovna bíbliufelag fyri deyv í Danmark. 25. - 27. mai fara vit til Bruxelles at halda møti.

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

## *12. Leygardagur* *2. Mós. 40.18-38*



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

At fáa starvsfólkahúsið upp, samstundis sum legurnar skulu fyrireikast og eisini haldast, er fyri okkum eitt ovurstórt tak. Vit eru takksom fyri tey, ið hava stuðlað og hjálpt við byggitilfari, og at tað er umleið hálvteknað við fólki at hjálpa til á legunum. Biðið, at vit fáa fulla manning. Ein ótti, ið lúrir, eru ísviðurskiftini, so skipið við byggitilfari ikki fær komið inn. Ein annar er, um nóg mikið av arbeiðs- og hjálparfólki verður. Jósafat segði í trongstøðu: „Gud okkara! … vit vita ikki, hvat vit skulu gera, men til Tín eru eygu okkara vend.“ 2. Krøn. 20.12.

**GRØNLAND**
**Juvel II, Anna og Óli Steinberg**

## 13. Sunnudagur 1. Kor. 1.1-17



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Ætlandi verða vit í Senegal 13. - 27. juni. Vit eru takksom, at Anna kann fyrireika seg at fara. Hjálparin Vikki kemur við. Tá vit noyddust heim fyri 10 árum síðan, vóru Skriftirnar ikki tøkar á saafimáli. Nú eru fleiri bøkur tøkar. Vit vilja so fegin bera saafifólki boðskapin.

## 14. Mánadagur 1. Mós. 35.1-15





**GRØNLAND, Nuuk**
**Hans Sivertsen**
**Filip og Ane Sivertsen, Cecilie 14, Kristian 12**
**Óli og Anne-Sophie Tindalíð, Liljan 12, Leanna 11**

Vit undirvísa frá 1. Mósebók og frameftir í smáum bólkum, men eisini einstaklingum eftir tørvi. Ynskiligt er, at fleiri taka lut, serliga nøkur, ið tosa grønlendskt. Vit eru takksom fyri ávøkst av miðvísu bíbliuundirvísingini. Í summar verða tríggjar barnalegur og ein familjulega. Tørvur er á starvsfólki og á manning at sigla børn til legurnar.

**GRØNLAND, Qasigiannguit, Solveig og Daniel Kinda**

Solveig hevur enn ikki fingið ríkisborgararætt í USA. Tí er Daniel farin einsamallur til Kanada at arbeiða uppá bátin Qaamaneq.

## *15. Týsdagur* *1. Kor. 1.18-31*



**NTM FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 7, Tabita 4, Debora 2**

Karissa Long, trúboðari á Papua Nýguinea undirvísir børnum á Numonohi Academy. Nógv teirra hava stórar dreymar um at ávirka heimin fyri Jesus. Tørvur er á fleiri lærarum.

## *16. Mikudagur* *1. Mós. 35.16-29*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen, Adonia 10**

Nú byrja vit trúarverjubólkar, har dentur verður lagdur á kristna lívið og bíbliuundirvísing. Tveir trúarverjuskúlar eru í løtuni. Tað gongur upp og niður hjá Adoniu.

**– Elin og Jógvan Jacobsen, Boas 10**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**

⋆ Í dag fyllir Emily Jacobsen 8 ár.

## *17. Hósdagur* *Sálmur 138*



**RUSSLAND, Moskva**
**Guðrun og Ivor Tutty**
**Sonja 17, Timothy 17, Karina 16**

Ivor skipar arbeiðið ímillum basker- og kalmykfólkið. Timothy fer nú til endaligar próvtøkur. Tað er krevjandi hjá okkum at flyta úr Moskva í summar.

## *18. Fríggjadagur* — *1. Kor. 2.1-16*



**ITALIA, Sant'Elia**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Noah 15, Megan 13,**
**Trisha 6, Emma 1**

Vit fluttu í heyst í onnur samkomuhøli, men av tí at samkoman er vaksin nógv síðstu mánaðirnar, verður helst neyðugt aftur at finna størri høli.

⋆ Í dag fyllir Uhenya Lukama 7 ár.

## *19. Leygardagu* — *1. Mós. 36.1-19*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

Árliga tiltakið á oynni í tríggjar dagar gekk sera væl. Túsundtals fólk fingu andaligan lesnað; menniskju eru søkjandi, men enn mangla nógvir trúboðarar her.

## *20. Hvítusunnudagur* — *1. Kor. 3.1-23*

**USA, Nebraska, Ethnos 360 (fyrrv. NTM)**
**Rachel og Peter Hansen, Caleb 15**

Vit fyrireika fundir í Onglandi og USA í juni og í Bolivia í juli. Vit ynskja at stimbra trúboðarar kring heimin.

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360 (fyrrv. NTM)**
**Wina og Benjamin Hansen, Noah Elias 6**

## 21. Annar hvítusunnudagur 1. Mós. 36.20-43



**TEILAND, Chiang Mai**
**Christy og Dan Jacobsen**
**Justin 16, Leslie 16, Jonathan 15,**
**Emily 8, Bethany 3**

Vit greiða einum av málhjálparum okkara, sum ikki er trúgvandi, frá einføldum sannleikum. Okkara málførleiki er avmarkaður, men Guds Orð hevur kraft.

⋆ Í dag fyllir Judah Flanagan 3 ár.

## 22. Týsdagur 1. Kor. 4.1-21

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen, Lele**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 9, Noah 8, Karis 4, Judah 3, Ethan 0**

Vit fara aftur til PNG í sept. Øll familjan hevur tað gott. Okkum tørvar at fáa øll neyðug skjøl so sum pass og visa, lækna- og tannlæknakanningar umframt heilsu- og ferðatrygging. Biðið fyri fundum í Norðurírlandi og Skotlandi og fyri ferðagóðsi til PNG. Simon undirvísir sínum síðsta flokki.

## 23. Mikudagur 1. Mós. 37.1-17

**SVEIS, Nyon, Westlake Church**
**Jeanette og Solomon Magura, Reuben 4, Micah 4**

Katie er ungdómsleiðari komandi tríggjar mánaðirnar og fer undir arbeiði millum tannáringarnar. Vit verða í Føroyum í juli.

⋆ Í dag fyllir Hanna Sharp 10 ár.
⋆ Í dag fyllir Josiah Lukama 14 ár.
⋆ Í dag fyllir Nya Flanagan 10 ár.

## *24. Hósdagur* *Sálmur 139*



**ZAMBIA, Ndola, GLO**
**Nanna og David Lukama**
**Josiah 14, Micah 11, Ezra 9,**
**Uhenya 7, Boas 4**

Saman við okkum arbeiða tríggjar familjur og fimm støk. Vit eru nú komin hálvan veg gjøgnum skeiðið Gap Year við 18 næmingum. Arbeiðið krevur okkum fult og heilt.

## *25. Fríggjadagur* *1. Kor. 5.1-13*

**PAPUA NÝGUINEA, Madang**
**Natalie og Philip Hansen, Louis 0**

Bíbliutímarnir á skúlunum ganga væl. Vit samráðast við eina trúboðarafamilju um at arbeiða saman við okkum og Stanley familjuni

⋆ Í dag fyllir Noah Berghamar 12 ár.

## *26. Leygardagur* *1. Mós. 37.18-36*



**GUINEA VESTURAFRIKA**
**Tarencha, Nalu**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Jens Allan 16, Ryan 9**

Sonur okkara Allan hevur verið á kostskúla síðani 4. flokk. Vit flyta nú til Dakar í eitt ár at vera saman við honum seinasta skúlaár. Marion hevur bíbliutímar fyri kvinnum og Hans Arni ein flokk, sum lærir at lesa og skriva. Heilsan hjá Hans Arna nú er góð.

## *27. Sunnudagur* *1. Kor. 6.1-20*

**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 12, Rebekah 10, Lydia 8**

Craig hevur júst verið í Teilandi á ráðstevnu um at fjølmiðla andaligt tilfar gjøgnum fartelefonina og gjøgnum sosialu miðlarnar. Okkum tørvar vísdóm at brúka hesar miðlar.

★ Í dag fyllir Jens Allan Jensen 17 ár.
★ Í dag fyllir Jonathan Jacobsen 16 ár.

## *28. Mánadagur* *1. Mós. 38.1-30*

**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Julie og Sonni Poulsen**

Sonur okkara Brian og konan Lili ganga á venjingarárinum. Umsókn hennara um uppihaldsloyvi fram til aug. varð ikki góðtikin orsakað av amerikonsku sjúkratrygging hennara. Tey royna at fáa aðra sjúkratrygging, so tey kunnu fullføra skúlaárið. Sjálvur havi eg verið á sjúkrahúsi við bruna, og orkan er lítil.

**FILIPOYGGJAR, Naplud, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**

**Útgevari:** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd:** Róland í Skorini, ábyrgd, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Selma Godtfred, Kristianna J. Heinesen, Jónvør Christiansen, Lea Wolles, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla:** Óla Hendrik av Fløtum, yngri, tel. 227057.
**Uppseting:** Palli Skorheim, tel. 290087.
**Myndasavn:** pallis76@yahoo.dk

## *29. Týsdagur* *1. Kor. 7.1-19*



**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 13, Aron 6, Noah Kristian 4**

Talið á fólki, ið søkja hjálp frá The Well tænastuni, er støðugt vaksandi. Biðið, at Harrin áhaldandi nýtir The Well at eggja trúboðarum at halda á í tænastuni og ikki gevast orsakað av mótloysi.

## *30. Mikudagur* *1. Mós. 39.1-23*



**OM FØROYAR**
**Anita og Oddmar Tausen**

Biðið fyri Rannvá Nattestad Mouritsen á STEP-skeiði í USA og fyri Annu Bettu Olsen, sum nú fer á STEP-skeið við Logos Hope, sum er í turrdokk í Meksiko frá 24. apríl til 25. mai. Síðan verður siglt til fleiri havnir í Meksiko. Vit eru spent at fara til Albania við 11 ungdómum í summar. Fyrireikingarnar eru byrjaðar, og vit gleða okkum at vitja samkomurnar hjá hesum ungu í apríl, mai og juni.

**Prent:** Føroyaprent, tel. 314555.
**Teldupostur:** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða:** www.kbs.fo

**©KBS.** *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

## Nýggj bók frá Logos!




### Skift fokus!

**155 kr**

Nýggja bókin hjá Carsten Hjorth Petersen snýr seg um barnauppaling. Gud og næstin eru í miðdeplinum. Hann hevur skapt okkum í kærleika; tí eiga vit eisini at bera øðrum kærleika Guds. Carsten leggur dent á, at um Gud ikki fyrst er í miðdeplinum í okkara egna lívi, so kunnu vit ikki røkka næsta okkara við kærleika Guds. Bókin eggjar vaksnum at liva soleiðis, at børnini uppliva, hvussu gott tað er at kenna Gud. Tá læra tey samstundis at hugsa um hini. Bókin er ætlað foreldrum og teimum, sum arbeiða við børnum.

Opið gerandisdagar kl. 14-18,
leygardag kl. 12-16.
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo